## 3 tími

*Staviorð:*

1 fjall
2 ella
3 rulla
4 skulu
5 lesa uppá
6 mugu
7 dagurin
8 veturin
9 døgurða
10 aka skíð
11 altíð
12 annað
13 góðar
14 gott veður
15 um kvøldið
16 um summarið
17 um várið
18 um heystið
19 stuttligt
20 keðiligt
21 børnini
22 smálombini
23 stundir
24 menninir
25 náttina
26 mangan
27 ljós
28 ljóst
29 nógv
30 kavabóltar
31 grønkast
32 leingjast
33 hoyggja
34 fyri
35 fuglar
36 fuglarnir
37 bøurin
38 teimum
39 heitum
40 londum
41 lombunum
42 long
43 ber
44 fer

Tá ið *um* stendur framman fyri tíðarmerking, er hon bundin.



**EIN SLUPP:**

Í søgu lesur tú um, tá ið føroyingar fóru at fiska við slupp. Tað var í 18??. Ja, nær mundi tað vera?

Greið frá eini slupp.
Tú finnur tekningar í onkrari bók um sluppir.
Kanska er ein slupp í bygdini, býnum, har tú býrt.
Munnu sluppir vera til enn? Hvat verða tær so brúktar til nú?
Spyr á skúlabókasavninum um bókmentir um sluppir.





### Fyrisøgn

*Um* vetur*in* er dagurin stuttur og náttin long. Tá er ofta *keðiligt* veður. Mangan mugu vit tendra ljós fyri døgurða. Tá sita børnini nógv inni og hava góðar stundir at lesa *uppá* og rokna; men tá ið kavi er, spæla tey úti, aka *skíð,* leypa skalv ella rulla kavabóltar.

*Um várið fer* kvøldið at *leingjast* og *bøurin* at grønkast. Tá koma smálombini; og fuglarnir koma aftur úr heitum londum.

Um summarið er gott veður og ljóst. Tá gloyma børnini ofta at fara inn um kvøldið. Tey spæla altíð og stund. Men um náttina mugu tey sova; tað *ber* ikki anna*ð* til.

Um heystið fara tey at hoyggja; og tá fara menninir á fjall eftir teim*um* lombunum, sum takast sku*lu*.